

*TV2 spældi besta poppin, sum Kongaríkið eigur, í eini 90 minuttir, og oddamaðurin í bólkinum, Steffen Brandt, kundu ikki lata verða við at gera sínar serstøku viðmerkingar til samráðingarnar millum danir og føroyingar*

# Danmark tá tað er best

*Danski bólkurin TV2 borðreiddi við tí besta poppinum, sum kongaríkið eigur. 700 fólk fingu Danmark, tá tað er best*

Eyðun Klakstein
Myndir: Jens Kr. Vang

– Vit koma við friði, ugh!

Oddamaðurin í TV2, Steffen Brandt, kundi ikki lata vera.

Hann tók stríðið, sum hevur verið millum føroyskar og danskarar politikarar farnu tíðina, til viðgerðar á sín serstaka hátt.

Eina ferð undir konsertini læs hann eina heilsan frá tí danska fólkinum, og hon snúði seg um, at »vit mugu hjálpa hvørjum øðrum«.

Og tá danski popparin hevði lisið sína heilsan, helt hann, at tað var hóskandi at spæla sangin: *Det' Danmark når det' bedst...*

Og so fingu teir einans 700 áskoðararnir Danmark, tá tað er best. Tryggan, skemtiliga og væl spældan popp. Eina røð av kendum sangunum og eina serliga heilsan til teir veruligu fjeppararnar, tá teir spældu sangir sum *Natradio* og *Rejsen til Rio.*

## Kvinnur sum so

Føroyski bólkurin, All That Rain, legði fyri, og teir tríggir tónleikararnir, sum eru betri kendir undir navninum Kjølar, spældu í sínum vanliga sannførandi stíli. Rocktónleikur við ans fyri tí góða lagnum og við ferð á.

Og eftir at at sangurin um Bornholm (ein gamal danskur sangur, sum TV2 byrjar sínar konsertir við) hevði ljómað úr hátalarunum, komu teir fýra í TV2 á pallin, og teir løgdu fyri við trimum sangum av frálíku útgávuni um *Heimsins eydnusamasta mann.*

Fyrst var tað *Kærligheden overvinder alt*, síðan sangurin, sum snýr seg um kvinnur sum so og tá *Det er samfundets skyld* varð spældur, mundi hvør einasti knokkur í høllini verða førur fyri at syngja liva við.

TV2 spældi nógvar av sínum kendastu sangum. Teir spældu *Verdens lykkeligste mand, Kys Bruden, Line Jørgensen Voldum* og *Be Babalula.*

Men tað snúði seg ikki bara um at spæla tey mest kendu sangirnar hjá bólkinum.

## Ein góð blanding

Á tíðindafundinum, sum var fríggjamorgunin, segði manningin í TV2, at teir ætlaðu at vísa føroyingum, at teir høvdu gjørt tónleik, síðani teir vóru her seinast í 1992.

Men teir løgdu dent á, at teir altíð spæla teir sangirnar, sum teir hava hug til. Og tað skuldi skiljast sum, at hittini frá 80'unum á ongan hátt vóru gloymd.

Og soleiðis var eisini við konsertini. Tað gjørdist ein blanding av eldri og yngri sangum, og so var neyvan nakar keddur av, at teir løgdu vera við at spæla miseydnaða, modernaða R&B-sangin *Yndlingsbabe*, sum er tittulsangurin á nýggjastu fløguni hjá teimum.

TV2 spældi eisini nakrar av teimum sangunum, sum meira er fyri fjeppararar enn kenningar. Frálíki *Rejsen til Rio* fekk uppiborna spælitíð so soleiðis var eisini við *Det mørke Jylland* og *Natradio.*

## Teir blástu eisini

Saman við teimum fýra høvuðslimunum í bólkinum vóru blásarar eisini við á pallinum, og tað riggaði framúr væl hjá teimum at fáa hornini við í tónleikin á ein natúrligan hátt.

Og sum heild var talan um høgt tónleikaligt støði. Ljóðið var sera gott alla tíðina, teir høvdu ikki serliga hart frá, men tað ljóðaði væl, og teir fýra limirnir í bólkinum, sum hava spælt so leingi saman, vístu eisini, at teir eru samanspældir.

Onkuntíð var tað helst auto-piloturin, sum varð sligin til, men tað var sannførandi og undirhaldandi alla tíðina.

Maðurin í miðjuni var Steffen Brandt. Tað er hann, sum meira enn nakar annar myndar TV2. Hann skrivar tónleikin og yrkingarnar, og hann hevur gjørt tað til ein av sínum specialitetum at koma við gullkornum millum sangirnar. Tað kláraði hann eisini í kjalarvørrinum á tí, sum fór fram í Keypmannahavn fyri 10 døgum síðani.

## Skjótt aftur

Tá TV2 hevði verið á pallinum í eini fimm korter, takkaðu teir fyri seg. Men sjálvandi var bæði pláss fyri og hugur til tveir eykasangir.

Og tá teir so komu á pallin aftur spældu teir *Der går min klasselærer*, áðrenn teir settu punktum við gamla hittinum *Bag duggede ruder.*

90 minuttir og so var liðugt.

Eftir loknan leik segði Steffen Brandt seg vera nøgdan við konsertina. Hann helt tað var passaligt av fólki, og lívið var gott.

Og so helt hann, at tað kundi blíva enn betri næstu ferð, teir koma til Føroya at spæla.

Og tey 700 á konsertini hesaferð munnu neyvan hava nakað ímóti, at TV2 vitjar skjótt aftur hendanvegin.

Tað er jú Danmark, tá tað er best...







Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttaSosialurin kann sjálvandi eisini lesast á alnetinum: www.sosialurin.fo

# VÍF hevur borðreitt til finalu

*Við sigrinum á strandingum syrgdu vestmenningarnir fyri, at teir enn hava møguleika at ogna sær gullmerkini. Sostatt er nú rættuliga lagt upp til stórdyst, tá Neistin komandi leygardag vitjar í Vestmanna*



*Eina løtu mundu vestmenningarnir kenna seg nakað kroystar, men tá samanum kom, vunnu teir ein tryggan sigur á strandingum*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

Jákup Mørk

StÍF-VÍF 20-30 (13-16)

Eftir at neistaleikararnir undanfarna vikuskifti vunnu inni á Skála móti StÍF, var greitt, at gulldysturin í bestu mansdeildini hetta kappingarárið skuldi standa millum Neistan og VÍF.

Júst hesi bæði liðini skulu sambært kappingarskipanini hittast í seinasta dystinum á árinum, men um talan skuldi gerast um nakra finalu, vóru boðini til vestmenningarnar greið. Dysturin á Skála skuldi vinnast, tí alt annað enn ein sigur vildi føra við sær, at gullkrónurnar endaðu í Havnini.

Onkur vildi kanska hildið, at uppgávan gjørdist nakað lættari, tí StÍF ikki longur hevði nøkur gullmerki at berjast fyri, og tískil kanska ikki løgdu so nógv í sjálvan dystin.

Hetta kom eisini til sjóndar, tá farið varð inn í høllina á Skála sunnudagin. Ikki tí, høllin var so at siga fullsett, men hetta var ikki orsakað av, at áskoðararnir hjá heimaliðnum rúgvaðu so nógv upp. Heldur var tað soleiðis, at ein heilur riðil av vestmenningum høvdu gjørt av stuðla hetjum sínum henda dagin.

## Høvdu gott tak á

At StÍF ikki hevði so nógvar áskoðarar sum vanligt í rygginum merkti tó ikki, at teir ikki gjørdu nakra roynd at vinna dystin.

Leingi var nevnliga líkt til, at teir høvdu eitt sera gott á Vestmenningum. Ivaleyst hevði tað sítt at siga, at StÍF leikarunum ikki nýttist at hava nervar av nøkrum slag, og tískil kundu leika fullkomuliga frígjørt.

Serliga var tað Artur sum gjørdi um seg, tá hann ferð eftir ferð slapp sær framvið mótstøðuleikarum og langaði bóltin í netið, aftan fyri Eli Müller, sum vardi VÍF málið fyrra hálva tíman.

Ein hevði tó varhugan av, at tað skuldi gerast VÍF, sum fór avstað við sigrinum, tí nakrar ferðir kom tað fyri, at strandingar royndu seg við dekan av smørtum fríspælingum, og tá hesar kiksaðu, var ikki líkt til, at nakar leikari legði nakað serligt í hetta.

Sum hálvleikurin leið, fekk VÍF eisini betri glið á sítt álopsspæl. Fyrstu løtuna vóru tað so at siga bert Ingi og Johnny, sum veruliga megnaðu at seta ferð á, men so við og við gekst eisini betri hjá viðleikarunum.

Móti endanum av fyrra hálvleiki fekk VÍF eisini togað seg fýra mál fram um, áðrenn strandingar aftur fingu minkað, soleiðis at trý mál vóru á muni, tá farið varð til hálvleiks.

## Bárður læsti dyrnar

Við trý mála stóru leiðsluni komu vestmenningarnir treystir út aftur á vøllin til seinna hálvleik, og nú varð skjótt greitt, at StÍF ikki skuldi hava meira at siga í hesum dysti.

Serliga var tað verjuparturin, sum nú riggaði betri, og hetta gav eisini skjótt bonus, soleiðis at liðið kundi vinna sær eina enn størri leiðslu.

Um tað vóru nervar, ella kanska vissan um, at nú var sigurin so at siga heima, skal eg lata vera ósagt, men miðskeiðis í hálvleikinum kom brádliga stígur í hjá vestmenningunum.

Í álopspartinum vildi einki rigga, og hetta førdi eisini við sær, at StÍF fekk sett fleiri mótálop ígongd. Lukkutíð hevði Bárður Nielsen valt júst hendan hálvleikin til at sýna eitt tað besta málmansavrikið í ár, og tískil kundi tað gera tað sama, um vestmenningar vóru leysir við honum, ella um talan var um brotskøst. Inn vildi bólturin ikki!

Móti endanum av dystinum fingu vestmenningar aftur glið á spælið, og so var dysturin liðugur fyri strandingarnir. Besta dømið um, hvussu lítið teir nú løgdu í sigurin, var helst, at tá teir aftur fingu eitt brotskast, varð Pól Jákup Poulsen, sum vardi málið í seinna hálvleiki, settur at skjóta, uttan at hetta tó bøtti um úrtøkuna móti Bárði.

## Finalan er nú eftir

Samanumtikið kann helst sigast, at VÍF vann dystin, tí teir vóru liðið, sum skuldi vinna dystin. Viljin og nærlagni var tað størri enn hjá strandingum, og hóast avrikið fyrstu løtuna var merkt av nervum, so mundu áskoðararnir vera samdir um, at dysturin fekk rætta vinnaran.

Strandingar hava enn ein dyst eftir at leika hetta kappingarárið, tá teir á heimavølli taka ímóti Kyndli, sum er á fjórað plássi. Ein dystur, sum í sjálvum sær einki hevur at siga, hvat plaseringum viðvíkur, men vónandi vilja bæði liðini enda kappingarárið við einum sigri, soleiðis at áskoðararnir hóast alt fáa ein undirhaldandi dyst at hyggja at.

Hava strandingar einki at spæla um í seinasta dysti sínum, so er øðrvísi statt hjá vestmenningum. Sum omanfyrinevnt, so skulu teir komandi leygardag spæla ein rættan finaludyst, tá Neistin kemur á vitjan.

Vinna vestmenningarnir henda dystin, eru teir meistarar, meðan javnleikur ella tap hevur við sær, at gullkrónurnar fara til Havnar.

Hvussu leikur fer at fara til ta tíð, man vera nyttuleyst at gita um, men eitt tykist í øllum førum púra víst.

Hondbóltskappingin hetta kappingarárið hevur verið ein av teimum mest spennandi nakrantíð, og hesin spenningur fer at halda sær til seinasta dyst, og vónandi til seinasta bríksl úr floytunum hjá dómarunum.

## Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
StÍF: Artur Johansen 9, Leivur Justinussen 4, Bent Djurhuus 2, Jónleif Sólsker 2 (1), Pauli Hansen 2, Marius Joensen 1
VÍF: Sámal Joensen 7 (4), Johnny Joensen 6, Harald Bjørgvin 4, Ingi Olsen 4 (1), Agnar Joensen 3, Martin Hummeland 2, Rógvi Nielsen 2, Sjúrður Holm 1, Petur Fr. Joensen 1
**Brotskøst:**
StÍF 4, VÍF 6
**Útvísingar:**
StÍF 2, VÍF 1
**Dómarar úr Stjørnuni:**
Geir Wardum og Carsten Andersen



*Rógvi Nielsen hevur seinastu dystirnar verið við til at styrkt um VÍF-liðið*
***Mynd: Álvur Haraldsen***